## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og regn. Seinnapartin minni vindur av vestri og sólglottar, men eisini regn- ella vátaslettingsælingur. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og kavi eitt skifti, annars sólglottar. Hitalagið millum ÷2 og +1 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Strúkur í vindi av útnyrðingi og kavaælingur. Hitin millum 0 og ÷3 stig., men týsdagin minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin omanfyri frostmarkið.

# Stórsligin sangleikur í Hoydølum

**SANGLEIKUR**
*Føroya Studentaskúli*

Godspell – eitur sangleikurin, sum verður frumframførdur á Føroya Studentaskúla mikudagin 6. mars.

Hetta er leikur, sum fyrstu ferð var framførdur á Broadway 17. mai 1971. Síðani hevur leikurin verið spældur um allan heimin. Nú verður hann so fyri fyrstu ferð framførdur í Føroyum.

Dánial Hoydal og Kristin Bæk hava umsett leikin til føroyskt.

Godspell er gamal skriviháttur fyri tað, sum ídag er kent sum gospel, men hendan framførslan er tó ikki nøkur gospel-konsert. John-Michael Tebelak, sum hevur skrivað leikin, var trúgvandi, men helt at vanliga guðstænastan í kirkjuni ofta kundi vera keðilig og kensluleys. Tí vildi hann gera ein leik, har søgan um Jesus varð fortald á ein nútíðar hátt, og har gleðin við boðskapinum skuldi vera tað berandi. Søgugongdin, ella leikbrotini, fylgja líknilsum og søgum serliga úr Matteusarevangeliinum.

Kendi sangskrivarin og tónaskaldið, Stephen Schwarts, ið m. a. hevur gjørt tónleikin til Disney-teknifilmarnar Pocahontas og Prince of Egypt – hevur gjørt tónleikin, og úrslitið av samstarvinum millum Tebelak og Schwarts gjørdist ein av best umtóktu leikunum á Broadway nakrantíð.

Tónleikatilfarið er á høgum støði og fevnir sera víða í stíli – frá rock til cabaret.

Sangirnir eru nýgerðir av kendum, gomlum enskum sálmum, har teksturin er varðveittur, men tónleikurin gjørdur um til nýmótans tónleik. Sangir sum Day by Day (tekstur frá 13. øld) gjørdust altjóða hitt.

Tey, sum fara at hyggja og lurta eftir Godspell, fáa eina stóra og fjølbroytta uppliving við tónleiki, sjónleiki, dansi, ljósi og ljóði. Eisini sjálv framførslan verður eitt sindur ørðvísi, enn fólk kanska eru von við. Tí ikki bara pallurin verður nýttur, sjálv høllin skal eisini brúkast fult út.

Leikararnir eru 15 í tali, kórið telur 30, og orkestrið 5. Høvuðsleiklutin hevur Líggjas Olsen. Talan er tó í stóran mun um eina kollektiva framførðslu, har allir staklutir hava sín leiklut. Flestu luttakarar eru næmingar í Hoydølum nú, men gamlir næmingar og onnur eru eisini við.

Samskipari er Hans Olivur Joensen, sum eisini arbeiðir við tónleikarum og sangsolistum. Ria Tórgarð hevur sjónleik, scenografi o.a. um hendi. Zacharias Sørensen tekur sær av kórinum, Jóna Thomsen hjálpir við dansinum, og Kári Øster syrgir fyri ljósi. Onnur hava á ymiskan hátt stuðlað og hjálpt til, m.a. Útvarp Føroya, Norðurlandahúsið og Tórhavnar Kvøldsskúli.

Tað ber til at lesa meira um leikin á heimasíðuni www.hoydalar.fo/godspell



## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷16 |
| Nuuk | ÷6 |
| Qaqortoq | ÷5 |
| Ammassalik | ÷3 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | 3 |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 9 |
| Tromsø | ÷2 |
| Bergen | 2 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | ÷4 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 12 |
| Róm | – |
| Malorca | 10 |
| Athen | – |
| Malta | – |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 7 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | 2 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 32 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 30 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 966 hPa. norðan fyri Ísland fer í landnyrðing og kuldabrúgvin haðani er farin eysturum Føroyar. Hátrýstið yvir Írlandi fer eystureftir.




Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og brúgvaløgini haðani verða yvir Føroyum fríggjadagin. Aftaná rekur kaldari luft móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/02 kl. 06[00]– 14/02 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 4,2°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 13/02 kl. 06[00]– 14/02 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 72,0 mm

ir ra r
Ári Rasmussen



Viðtala fæst:
Argjum 320212
Runavík 448102



* Dustsúgvarar
* Mikroovnar
* Kaffimaskinur
...og mangt annað
Elkeyp
... so einfalt
VikuBlaðið 321 000

## VESTFALLSKYRRINDI

12. februar: Tendring
14. februar: Mánin longst frá jørðini
20. februar: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna— sundi fp. | sp. | Mykines— firði fp. | sp. | Nólsoyar— firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna— sundi fp. | sp. | Fugloyar— firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. feb | 09.00 | 21.17 | 08.00 | 20.17 | 08.15 | 20.32 | 11.00 | 23.17 | — | 12.00 | 07.15 | 19.32 | 06.15 | 18.32 | 09.15 | 21.32 | 10.15 | 22.32 | 08.45 | 21.02 | 10.00 | 22.17 |
| 16. feb | 09.34 | 21.52 | 08.34 | 20.52 | 08.49 | 21.07 | 11.34 | 23.52 | 00.17 | 12.34 | 07.49 | 20.07 | 06.49 | 19.07 | 09.49 | 22.07 | 10.49 | 23.07 | 09.19 | 21.37 | 10.34 | 22.52 |
| 17. feb | 10.09 | 22.26 | 09.09 | 21.26 | 09.24 | 21.41 | — | 12.09 | 00.52 | 13.09 | 08.24 | 20.41 | 07.24 | 19.41 | 10.24 | 22.41 | 11.24 | 23.41 | 09.54 | 22.11 | 11.09 | 23.26 |
| 18. feb | 10.44 | 23.03 | 09.44 | 22.03 | 09.59 | 22.18 | 00.26 | 12.44 | 01.26 | 13.44 | 08.59 | 21.18 | 07.59 | 20.18 | 10.59 | 23.18 | 11.59 | — | 10.29 | 22.48 | 11.44 | — |

5 707265 100050 >